UTTAN ÚR HEIMI

## Kanna trygd á ferjum

Týska bileigarafelagið ADAC hevur kannað ymisk viðurskifti umborð á ferjum, sum sigla á umleið 30 ymsum teinum kring Evropa. Niðurstøðan í kanningini er, at ferjurnar hjá norska reiðarínum Color Line eru tær bestu, og at ferjan "Color Fantasy" er tann tryggasta í Evropa. Ferjurnar hjá reiðarínum Scandlines, sum sigla ímillum Svøríki og Týskland, fáa eisini gott skoðsmál.

Verri er við níogvum av teimum ferjunum, sum sigla í Miðjarðarhavinum. ADAC sigur, at serliga illa stendur til umborð á ferjunum hjá grikska reiðarínum Agoudimos Lines. Sagt verður, at umborð á ferjuni "Penelope A" er navigasjónsútgerðin í lagi, men tað er eisini tað einasta, sum er nóg gott.

Kunningarstjórin hjá Color Line, Helge Otto Mathisen, sigur við Aftenposten, at úrslitið av týsku kanningini hevur stóran týdning fyri reiðaríið, tí týskarar leggja stóran dent á trygdina umborð á ferjunum. Hann roknar við, at umleið 550.000 týskarar koma til Noregs í ár við ferjunum hjá Color Line.

## Gátan loyst?

Bretska blaðið Daily Mail heldur seg hava loyst gátuna um tann duldarfulla klaverleikaran, sum hevur verið í varðveitslu hjá bretsku løgregluni, men sum ikki dugir at siga, hvør hann er.

Blaðið hevur fingið fatur á einari mynd av kekkiska bólkinum Ropotamo. Myndin er tikin í 1983, og ein av tónleikarunum líkist sera nógv klaverleikaranum. Maðurin á myndini eitur Tomas Stnad, og sagt verður, at hann dugdi at spæla verk hjá Chopin, Mozart og Lizt uttan nótabók, longu tá hann var ungur. Ein annar tónleikari í Ropotamo siogur, at hann møtti Tomasi Stnad í Prag í apríl, og at hesin tá ætlaði sær av landinum at royna seg sum klassiskur klavertónleikari.

Tann duldarfulli klaverleikarin hevur verið á einum sjúkrahúsi, síðani bretska løgreglan kom fram á hann. Hann hevur ikki sagt eitt orð, men hevur hildið fleiri konsertir á sjúkrahúsinum. Hóast løgreglan hevur almannakunngjørt fleiri myndir av honum, hevur hon framvegis ikki fingið vissu fyri, hvør maðurin er, skrivar Reuter.

## Fingu ikki "Stelluna"

Í Bergen vildu fólk fegin hava fatur á stóra seglskipinum "Stella Polaris", sum júst hevur verið til sølu. Skipið var í síni tíð flaggskip hjá Det Bergenske Dampskibsselskap, og nú tað var til sølu, varð roynt at fáa tað aftur til býin.

Tað vóru japanar, sum seldu skipið. Teir vildu hava 800.000 dollarar fyri tað, og endin var, at onkur á Virgin Islands keypti tað. Í Bergen eru tey misnøgd við japanska framferðarháttin, tí tey halda ikki, at tey fingu allar upplýsingar í sambandi við søluna, og harafturat setti seljarin ymsar løgnar treytir, sum einki høvdu við sjálva søluna at gera.

Men fólk í Bergen ætla kortini ikki at sleppa endanum. Bergens Tindende skrivar, at tey ætla at seta seg í samband við tann, sum keypti "Stelluna", tí ætlar hann sær at seta skipið í stand og at selja tað aftur, ætlar Bergen at liggja framvið.

## Nú hevur hann 11 konur

Kongurin í Swazilandi, Mswati 3., hevur fingið sær eina konu afturat. Tann seinasta er tann 21 ára gamla Moliqwa Ntentsa, og sostatt hevur tann 36 ára gamli kongurin nú ellivu konur.

Men tær verða ætlandi uppaftur fleiri, tí sambært myndugleikunum hevur hann longu valt sær tvær afturat. Nothando Dube og Xollie Titi Magagula eru 17 ára gamlar. Tær gingu í skúla, men tá kongur fekk áhuga fyri teimum, máttu tær gevast í skúlanum, tí sambært reglunum skulu tær fyrireika seg til at giftast kongi. Ein liður í fyrireikingunum er, at tær skulu bera barn kongs undir belti, áðrenn tær kunnu giftast honum, og leysasøgur vilja vera við, at onnur teirra er longu við barn. Hon verður tí væntandi tann 12. drotningin.

Tað er ikki greitt, at Mswati 3. ætlar at fáa sær líka nógvar konur, sum pápi hansara hevði. Hann hevði ikki færri enn 70 konur, sum hann fekk 210 børn við, áðrenn hann doyði í 1982.

# Aftur eitt "nei" í dag

**Franska avgerðin at vraka ES-grundlógina fær ávirkan á fólkaatkvøðuna í Niðurlondum í dag. Tað kann gerast mønustingurin**

FÓLKAATKVØÐA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í dag skulu niðurlendingar taka støðu til ta ætlaðu ES-grundlógina, men longu áðrenn valhølini lata upp, tykist greitt, at svarið har verður tað sama sum í Fraklandi.

Eygleiðarar søgdu í gjár, at flestu niðurlendingar hava langt síðani gjørt av at siga nei í dag, og at úrslitið í Fraklandi hevur sannført uppaftur fleiri um, at teir eiga at siga nei. Harafturat kann franska úrslitið hava við sær, at áhugin í Niðurlondum er vorðin minni, og at luttøkan tí verður minni, enn hon annars hevði verið.

Niðurlendski forsætisráðharrin, Jan Peter Bakemende, segði mánadagin, at tað franska úrslitið var harmiligt, men at tað kortini er umráðandi, at niðurlendingar atkvøða fyri grundlógini.

- Úrslitið í Fraklandi ger, at uppaftur fleiri okkara eiga at atkvøða jua, tí grundlógin er tað rætta grundarlagið undir framtíðar avropeiskum samstarvi, segði Balkemende. Bæði hann og tey, sum vilja hava niðurlendingar at siga nei, hava lagt dent á, at fólk eiga ikki at lata seg ávirka av tí, sum hendi í Fraklandi.

Atzo Nicolai, sum er ráðharri í evropeiskum viðurskiftum, hevur ávarað niðurlendsku veljararnar ímóti at atkvøða ímóti ES-grundlógini.

- Eg ætli mær ikki at virka fyri einari fólkaatkvøðu afturat, siga fólk nei hesaferð, og eg dugi heldur ikki at síggja, at londini kunnu endurskoða ætlanina við grundlógini, segði hann í gjár.

Men tey, sum eru ímóti grundlógini, eru ikki samd við honum í hesum. Tey halda, at vraka fleiri lond grundlógina, sleppur ES ikki undan at hyggja at uppskotinum eina ferð afturat.

Vraka niðurlendingar grundlógina, er tað sera sannlíkt, at Tony Blair fer at avlýsa ta ætlaðu fólkaatkvøðuna í Bretlandi. Aftan á úrslitið í Fraklandi segði hann, at Bretland bíðar eftir, hvat niðurlendingar fara at gera, og fleiri bretsk bløð skrivaðu í gjár, at fólkaatkvøðan har verður avlýst, siga niðurlendingar nei. Eygleiðarar siga, at so hevur grundlógin fingið mønustingin.

# Hon kann fáa deyðadóm



*Schapelle Corby skar í sjóheitan grát, tá indonesiski rætturin dømdi hana 20 ára fongsul*

**Tann 27 ára gamla Schapelle Corby úr Avstralia kann fáa deyðarevsing fyri rúsevnissmugling**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein indonesiskur dómstólur dømdi í síðstu viku Schapelle Corby 20 ára fongsul fyri at hava smuglað 4,1 kilo av marihuana. Men verjar hennara halda uppá, at hon er ósek, og nú hava teir gjørt av at skjóta dómin inn fyri indonesiska hægstarætt. Tað er váðamikið, tí sambært indonesiskari lóg kann Schapelle Corby fáa deyðarevsing, og eygleiðarar siga við Reuters, at tann møguleikin er avgjørt til staðar.

Tann 27 ára gamla kvinnan bleiv tikin á oynni Bali, tá tollararnir funnu 4,1 kilo av marihuana í viðføri hennara. Hon heldur uppá, at onkur hevur koyrt rúsevnið í kuffertið, uttan at hon visti av tí. Men tað halda indonesisku myndugleikarnir ikki.

Málið hevur vakt stóran ans í Avstralia, og meiningakanningar hava víst, at har ivast fólk ikki í, at Schapelle Corby er ósek. Nógv fólk í Avstralia krevja, at landið skal taka aftur hjálpina, sum bleiv lovað Indonesia aftan á flóðalduna annan jóladag, men tað vil stjórnin ikki.